# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Gransking fær møguliga pengar frá einskiljing



*Jóannes Eidesgaard skal í heyst finna eina politiska semju um, hvat inntøkurnar frá einskiljingunum skulu brúkast til. Hann hevur fyrr lovað granskingini ein triðing ella upp til eina milliard krónur*

**Politisk semja er ikki funnin um, hvat inntøkurnar frá einskiljingunum skulu brúkast til. Men Jóannes Eidesgaard vónar, at okkurt kann fara til gransking.**

GRANSKING
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Lógaruppskot um búskapargrunn verður lagt fyri tingið í heyst. Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, í viðmerking til, at fráfarandi stjórin í Granskingarráðnum, Rúna Hilduberg, í Sosialinum í gjár eftirlýsti eina milliard krónur, sum var horvin úr løgmansrøðuni.

Í ólavsøkurøðuni fyri tveimum árum síðani lovaði løgmaður, at inntøkurnar frá einskiljingini skuldu setast í grunn, og upp til ein milliard av hesum skuldi oyramerkjast til gransking.

Í seinastu ólavsøkurøðu endurtók hann nøkunlunda tað sama. Men í ár vóru onki lyfti um pengar til granskarar.

Í frágreiðing síni til tingi á ólavsøku segði løgmaður, at, løgtingið hevur samtykt, at einskiljingarinntøkur landsins ikki skulu inn í vanliga raksturin hjá landskassanum, men skulu annaðhvørt nýtast til at gjalda skuld niður við ella setast í búskapargrunn.

Tað vil siga, at tað ikki liggur fast, at ein partur skal í búskapargrunn, men er ein spurningur um politiskar tingingar.

Í frágreiðingini verður onki sagt um, hvat pengarnir í búskapargrunninum skulu brúkast til, men at arbeitt verður at finna eina breiða politiska semju.

Við Sosialin sigur Jóannes Eidesgaard, at landstýrið framvegis er sinnað at seta pengar av til gransking.

- Landstýrið hevur fleiri ferðir hevur umrøtt málið, og semja tykist at vera um, at tað er skilagott at lata upp fyri møguleikanum, at ein partur av pengunum verður settur av til gransking, sigur Jóannes Eidesgaard við Sosialin.


# Vilja og hugflog til at standa á odda fyri føroyskari gransking?

## Starvið sum granskingarstjóri er nú leyst at søkja.

Vit sóknast eftir einum persóni við sannføring um, hvønn týdning gransking hevur fyri eitt nútíðar samfelag. Tú hevur sinni og vilja til at leggja orku og hugflog í at bera føroyska gransking framá.

Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja møguleikar. Tú skalt kunna seta teg inn í granskingarligar og granskingarpolitiskar spurningar og skapa eitt umhvørvi, ið kann nøkta tørvin á heimligum og altjóða samstarvi á økinum.

Á skrivstovuni starvast frammanundan tvey fólk, ið arbeiða við evropeiskum granskingarskipanum og føroyskum møguleikum har.

Stjórin er samstundis skrivari hjá Føroya Vísindaráð.

**Uppgávur**
Uppgávurnar hjá stjóranum eru strategiskar og umsitingarligar. Millum uppgávurnar eru at:

- umsita Granskingargrunnin í samstarvi við Granskingarnevndina
- gera uppskot til fíggjarætlan og hava ábyrgd av, at fíggjarætlanin verður hildin
- gera ársfrágreiðing
- fyrireika og skipa fyri, at granskingarstuðul verður lýstur og bjóðaður út, standa fyri málsviðgerð og meting av umsóknum og hava ábyrgd av eftirliti við játtaðum granskingarstuðli
- útinna tær yvirskipaðu ætlanirnar hjá Granskingarnevndini
- virka fyri at gera tilfar um gransking lættari atkomuligt hjá granskarum, vinnulívi og almenninginum
- virka fyri øktum samstarvi millum allar viðkomandi partar
- skipa fyri og røkja sambond við altjóða granskingarstovnar og –umhvørvi

**Skrivari hjá Føroya Vísindaráð**
Sum skrivari í Vísindaráðnum skal stjórin saman við løgmanni leggja fundirnar í Vísindaráðnum til rættis, skapa og fáa til vegar neyðugt málstilfar, ið skal vera grundarlag undir arbeiðinum hjá Vísindaráðnum við at orða ein yvirskipaðan granskingarpolitikk fyri Føroyar. Tú skalt skipa fyri fundunum í Vísindaráðnum, skriva fundarfrágreiðingar og saman við Granskingarnevndini skipa fyri, at politikkurin hjá Vísindaráðnum verður útintur á besta hátt.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú hevur viðkomandi hægri útbúgving frá lærdum háskúla og førleika til at átaka tær skyldurnar, ið starvið krevur.

Ynskiligt er, at tú hevur leiðsluroyndir frá almenna og/ella privata arbeiðsmarknaðinum. Tú skalt hava góð samstarvsevni og hegni til og royndir av at taka upp nýggj sambond og byggja netverk.

Umsøkjarar við granskingarroyndum hava fyrimun.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært Løgtingslóg nr. 33 frá 4. mai 2006 (sí nærri høgrumegin) og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Talan er um eitt áramálssett starv í t.d. 5 ár við einum lønarískoyti, sum partarnir samráðast um.

Umsóknir við prógvum, c.v. og øðrum skulu sendast til

Granskingarráð Føroya
Bryggjubakki 12
100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er mánadagin 3. september 2007.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Eyðun Andreassen, formann í Granskingarráð Føroya, tel. 228820.

Løgtingslóg nr. 33 frá 4. mai 2006 er lóg um gransking í Føroyum, ið verður skipað við Granskingargrunninum og Føroya Vísindaráð.

Granskingargrunnurin er sjálvstøðugur stovnur, sum skal virka fyri at menna føroyskan granskingarførleika. Grunnurin fær árliga játtan á fíggjarlógini og kann taka ímóti stuðulsfæi frá øðrum.

Granskingarnevndin hevur ovastu leiðsluna av Granskingargrunninum. Hon hevur 7 limir, ið eru valdir av Føroya Landsstýri og pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Stjórin situr fyri virkseminum og hevur ábyrgd av, at virksemi grunsins verður rikið sambært galdandi reglum.

Stjórin í Granskingargrunninum er eisini skrivari hjá Føroya Vísindaráð, ið orðar yvirskipaða granskingarpolitikk Føroya við felags hugsjón, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan. Løgmaður er formaður í Føroya Vísindaráð. Hinir limirnir eru landsstýrismenninir saman við pørtunum á arbeiðsmarknaðinum og umboðum fyri føroyskar granskingarstovnar.

sansir.fo

Granskingarráðið · Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 31 65 15 · Faks 35 31 01 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL